

*Símin í Túni handaði fyri nøkrum árum síðani venesuelska forsetanum Hugo Chavez eintak av Nýggja Testamenti á yaonmami málinum. Tað var Hugo Chavez fegin um. Nú vil hann hava NTM at fara úr Venesuela*

# Føroyskir trúboðarar vístir úr Venesuela

**Forsetin í Venesuela hevur givið boð um, at NTM trúboðarafelagsskapurin skal stinga í sekkin. Tað ber við sær, at føroyingar, sum hava arbeitt millum innfødd í tredivu ár, nú mugu taka seg aftur úr Venesuela**

ÚTVÍSTIR FØROYINGAR
*Jóannes Hansen*

Trúboðarafelagsskapurin New Tribes Mission, NTM, sum fleiri føroyingar eru partur av, hevur frá forsetanum í Venesuela, Hugo Chavez, fingið boð um, at forsetin ikki vil hava felagsskapin at halda fram við sínum arbeiði í Venesuela, har NTM hevur arbeitt í meiri enn eina hálva øld.

Tíðindini hava seinastu dagarnar verið borin í altjóða fjølmiðlunum. Niðurstøðan hjá eygleiðarum er, at talan er um populistiskt tiltak hjá umstrídda forsetanum. Tað eru tveir mánaðir til kongressvalið í Venesuela, og forsetin heldur seg ivaleyst hava betri møguleikar fyri størri undirtøku, um hann spennir anti amerikanska bogan. NTM hevur tey seinastu árini gjørt nógv fyri at vinna sær altjóða profil, men felagsskapurin var í síni tíð stovnaður av amerikumonnum, og høvuðsskrivstovan er í Florida.

Føroyingar eru nógv uppi í NTM. Óli á Grømma Jacobsen úr Klaksvík er formaður í aðalnevndini, sum hevur ábyrgdina av 3500 trúboðarum, og í Venesuela arbeiða føroyingar í sambandi við NTM. Føroyingarnir hava tó allir verið heima, meðan politiski ágangurin er vorðin alt størri.

Føroyingarnir í NTM í Venesuela eru Dania og Símin í Túni, sum búgva á Toftum, Erla og Ingvard Petersen, sum í løtuni búgva í Havnini, og Jóhannes Frants Poulsen, sum í løtuni er í heimbygdini á Eiði. Símin fór til Venesuela í 1975. Síðani 2000 hava hann og familjan búð í Føroyum, men Símin hevur alla tíðina verið partur av Bíbliuumsetingararbeiðnum, og hann hevur fleiri ferðir tey seinastu árini verið í Venesuela.

Jóhannes Frants Poulsen, sum hevur verið í Venesuela síðani í 1998, kom seint í summar heim. Ætlanin hjá honum hevur verið at steðga her inntil eftir árskiftið. Erla og Ingvard Petersen komu heim mitt í summar. Ætlanin hjá teimum hevur verið at steðga inntil næsta summar.

Hugo Chavez er avgjørdur í, at NTM skal stinga í sekkin og fara úr Venesuela. Hann hevur tó lagt afturat, at talan skal vera um hampuliga framferð, og at NTM fólkini skulu fáa tíð at rudda upp eftir sær, áðrenn tey fara úr landinum.

Á Toftum fylgir Símin í Túni væl við í, hvat er at frætta úr Venesuela. Hann er formaður í NTM Føroyar nevndini, ið hevur sum mál at upplýsa um felagsskapin og eisini at vera millumlið millum føroyingarnar, sum virka í NTM høpi, og so samkomur og einstaklingar:

– Fyrst í vikuni ljóðaði, at guvernørurin yvir Amazonas økinum skuldi í kunngerð hava givið boð um, at hann vildi hava NTM fólkini at fara beinanvegin. Tá gav leiðslan í NTM í Venesuela boð um, at trúboðararnir beinanvegin skuldu gera seg til at flyta. Teir kundu bara hava rættuliga avmarkaðar nøgdir av viðføri við sær. Ingvard Petersen fór mánadagin úr Føroyum og til Venesuela. Tá vistu vit ikki, um tað fór at eydnast honum at sleppa inn í landið. Ørindini hjá honum eru at fara inn í Parima, har vit hava búð, og har átta føroyingar í 1988 vóru og bygdu okkum sethús. Nú er støðan ikki heilt so akutt, sum hon var fyrr í vikuni. Nú vísir tað seg, at tíðindini um, at guvernørurin skuldi hava givið boð um skjóta útvísing, ikki vóru sonn.

*Hvussu sært tú upp á støðuna?*

– Vit hava verið har í mong ár, og sjálvandi kennist tað svárt, at tað í løtuni ikki tykist vera møguleiki fyri at halda fram við arbeiðnum. Vit eiga nógvar vinir millum tey innføddu, og hóast vit eru komin væl ávegis, so høvdu vit vónað at hildið fram við arbeiðnum í nøkur ár afturat. Málið hjá NTM er at arbeiða fram ímóti at gera seg sjálvt arbeiðsleyst. Men so langt vóru vit ikki komin enn.

*Hvat hugsar tú um?*

– Málið hjá okkum er at boða gleðiboðskapin og at seta samkomur á stovn, sum tey innføddu sjálvi skulu hava ábyrgdina av. Vit hava kunngjørt gleðiboðskapin í hesum ættarbólkinum seinastu fimtan árini. Í sambandi við verkið hava vit arbeitt nógv á heilsuøkinum, á sosiala økinum, á landbúnaðarøkinum og á skúlaøkinum. Hetta er heilt víst komið samfelagnum og indianarunum til góða, hóast eg væl